SOSIALURIN 3
FRÍGGJADAGUR 9. JANUAR 2015


HPV:

# TORI EG AT KOPPSETA DÓTTUR MÍNA?



Helena legði stillisliga telefonina niður á køksborðið. Nú var hon komin í iva. Avgerðin, ið hon fyrr hevði verið so sannførd um, var nú merkt av ótta og ivin kom sníkjandi. Nú var tað longu í næstu viku, at 12 ára gamla dóttirin skuldi koppsetast. Men hvat um tað, ið vinkonan akkurát hevði sagt henni, passaði?

Útslett! Lammilsi! Deyði! Kundi tað veruliga enda so galið? Hugsa tær, um dóttirin endaði í rullistóli restina av lívinum. Tó samstundis vildi hon sjálvandi ikki, at dóttirin skuldi fáa krabbamein og møguliga ongantíð fáa nøkur børn, ella í ringasta føri doyggja. Hon hevði jú eisini lisið, at árliga fáa umleið 10 føroyskar kvinnur staðfest krabbamein í lívmóðurhálsinum og á hvørjum ári doyr ein kvinna av sjúkuni. Tað var sanniliga eisini álvarsamt og ótrúliga nógvar, hugsar hon. Kaffikoppurin dumsar heldur harðliga niður á køksborðið. Helena kemur aftur til veruleikan. "Dilemma! Nei, hetta er ikki ein avgerð fyri eina mammu," sigur hon hart fram fyri seg.

Helena er eitt hugsað dømi, um hvussu foreldur kunnu hava tað, tá tað kemur til avgerðina um HPV-vaksinuna. Nógv hevur verið frammi um vaksinuna, bæði í sjónvarpi, bløðum og á Facebook. Fleiri av hesum frásagnum hava ikki verið so jaligar, og nógv dømir upp á keðilig hjáárin av vaksinuni eru komin fram. Lammilsi, hjartatrupulleikar og deyði er bert ein lítil partur av teimum ræðandi søgunum. Vegna allar hesar mótstríðandi upplýsingarnar, ið tala bæði fyri og ímóti HPV-vaksinuni, kann hetta tískil gerast ein stór og torfør avgerð hjá neyðars Helenu.

## Fyribyrgjandi tilboð

Í dag kunnu allar gentur og kvinnur í aldrinum 12 til 28 ár lata seg koppseta ókeypis fyri lívmóðurhálskrabba (HPV). Tilboðið kom frá heilsumálaráðnum.

Koppseting fyri HPV-virus hevur til endamáls at fyribyrgja, at kvinnur fáa lívmóðurhálskrabba. Vónin er, at gentur og kvinnur taka av hesum tilboði. Sambært heimsheilsustovninum hjá ST (WHO) eru fleiri fyrimunir enn vansar við koppsetingini. Vaksinan verður við jøvnum millumbilum kannað, um hon samsvarar við sítt endamál. Fær ein genta ella kvinna álvarsom hjáárin, skal hon seta seg í samband við læknan og fáa røttu viðgerð.

## Hvat er hótt?

Velur Helena ikki at lata dóttrina koppseta, er vandi fyri, at gentan fær HPV-smittuna, tá hon gerst seksuelt virkin. Verður dóttirin smittað við HPV-virus, kann tað í ringasta føri enda við lívmóðurhálskrabba. Fyri at HPV-vaksinan skal gera mest møguliga nýttu, er best at koppseta gentuna, áðrenn hon gerst seksuelt virkin.

Velur Helena hinvegin at lata dóttrina koppseta, er vandi fyri, at gentan fær ymisk hjáárin. Sambært medicin.dk eru tey mest vanligu hjáárinini, reydlig húð á innstiksstaðnum og høvuðpína. Minni vanlig eru feppur, pína í beinum og ørmum. Meira sjáldsamt og hættisligt er ein ovurviðkvæmisreaktión, ið førir við sær andadrátstrupulleikar og blóðtrýstfall. Tí er viðmælt at bíða hálvan tíma á staðnum, har ein hevur fingið vaksinuna, tí tey hava røttu viðgerðina.

## Allur heilivágur hevur hjáárin

Sjálvt Panodil, ið flest øll taka uttan at seta nakað spurnartekin við tað, kann eisini hava hjáárin.

Danska Sundhedstyrelsen hevur stórt fokus á hjáárin av vaksinum. Øll hjáárin verða almannakunngjørd á heimasíðu teirra, hetta fyri at tryggja opinleika og gjøgnumskygni. Hóast nógvar fráboðanir um álvarsom hjáárin av HPV-vaksinuni, so sum hættisligt ovurviðkvæmi og lammilsi, er tað ikki nakað mynstur at síggja og einki bendir á, at tað er samband ímillum vaksinuna og álvarsomu hjáárinini. Heilivágur verður bert góðkendur, um tað eru fleiri fyrimunir enn vansar, og soleiðis er eisini við vaksinum.

Allur heilivágur gevur árin og hjáárin.

## Viðmæla vaksinuna

Heilsumyndugleikarnir, Sundhedsstyrelsen og WHO viðmæla, at ein fær HPV-vaksinuna, tí vaksinan er við til at fyribyrgja lívmóðurhálskrabba, sum er ein sera vandamikil sjúka. Serfrøðingarnir meta, at møguleikin fyri hjáárinum er so lítil, og vandin fyri at doyggja av lívmóðurhálskrabba er nógv størri.

Á heimasíðuni krabbamein.fo stendur: "Kring heimin doyggja áleið 275.000 kvinnur árliga av lívmóðurhálskrabba, ið sostatt krevur fleiri hundrað lív hvønn einasta dag. Tær, sum doyggja, eru kvinnur í bestu árum. Koppseting og regluligar kanningar eru besta fyribyrging.

Fólk gerast sjúk hvønn dag og nógvar eru orsøkirnar til sjúkurnar.

Hvørja ferð nýggjar vaksinur koma út, vilja tað koma nógvar ymiskar reaktiónir. Eitt nú vísir tað seg, at gerast fólk sjúk eftir at vera koppsett, so seta tey tað í beinleiðis samband við sjálva koppsetingina. Tá er tí umráðandi at duga at skyna ímillum tilvild og orsøk.


HPV-virus smittar mest gjøgnum kynsliga samveru. Hít verjir ikki móti HPV

## Koppseting í søguligum høpi

Tá tær fyrstu vaksinurnar komu fram í Evropa mitt í 18. øld, vórðu tær viðurkendar av samfelagnum og innførdar í skúlum og herinum. Nógvur kritikkur kom fram, tí hildið varð, at ov stórur váði var tongdur at vaksinuni og ivi var um trygdina av handfaringini. Eftir at tað almenna byrjaði at hava eftirlit við tilgongdini vaks álitið til vaksinuna. Í dag er vaksinan ein sjálvfylgja í fólkaheilsuhøpi, tó kemur tað meiri enn so fyri, at álitið skinklar og óttin spøkir.

## Hjáárin og HPV á eina vágskál

Sum nevnt hevur Helena fingið nógv neiligt at vita í samband við koppsetingina, bæði á netinum og eisini frá vinkonuni. Ótti er ofta tongdur at vantandi vitan. Tí hevði tað verið skilagott, um Helena vigaði hjáárinini upp ímóti lívmóðurhálskrabba. Hetta átti at givið henni størri vitan til at tikið eina kvalifiseraða avgerð og verið við til at fingið óttan burtur.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## HEILSUFRAMI OG FYRIBYRGING

Sum partur av sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingini á Fróðskaparsetri Føroya verður skrivað grein innan heilsufremjan og fyribyrging. Tey lesandi eru tá komin um hálva leið í útbúgvingini. Hesar greinar viðgera sjúkrarøktarfakligan spurdóm innan heilsuframa og/ella fyribyrging í samfelagsligum høpi. Komandi vikurnar prentar Vikuskifti nakrar av hesum greinum



**Skriva greinina hava:**
Frá vinstru: Rebekka Norðoy, Katrin Frederiksberg og Ebba Lisberg Hansen